# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# STRÍÐ UM PARKERING Í HAVN

Ein parkeringsorrusta tykist taka dik á seg millum topparnar í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, borgarstjóra, og Jógvan Arge, býráðslim. Orsøkin er, at Jógvan Arge hevur talað at, eftir at kommunan seinastu árini hevur tikið burtur fleiri parkeringspláss í miðbýnum – og sum tað síðsta seldi parkeringsplássið í Tórsgøtu til Tryggingarfelagið Føroyar at byggja hotell á.

Alt gott um grøna hugsunarháttin hjá Tórshavnar kommunu. Royndin við ókeypis bussleiðini eru góð – ja beinleiðis genial. Hetta er uttan iva besti mátin at venja fólk við at brúka bussin.

Men hóast grønan hugsunarhátt, so er ikki neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at føra ein so hatskan bilpolitikk. Tað tykir nærmast, sum um borgarstjórin vil hava ein bilfrían miðbý. Og vil hann tað, so fær hann eisini ein fólkatóman og handilstóman miðbý. Ein treyt fyri handilslívinum í miðbýnum er, at tað ber til hjá fólki at koma í býin við bili - og fáa sett bilin frá sær.

Tórshavnar kommuna gjørdi eina roynd í áttatiárunum at steingja Niels Finsensgøtu - gongugøtuna - fyri allari bilferðslu. Hetta merkti beinanvegin, at sølan í handlunum fór í botn. So varð latið uppaftur, og vit fingu eina gongugøtu við bilum og parkeringsplássum, og so blómaði handilslívið aftur.



Tað er ikki uttan orsøk, at eitt nú SMS hevur brúkt kanska hundraðtals milliónir upp á parkeringspláss og parkeringskjallara. Tey hava sjálvandi sæð, at uttan góð parkeringsviðurskifti, so fáa tey ikki fólk at koma í SMS.

Í miðbýnum í Havn verður ikki hugsað um veðurviðurskifti, tá bygt verður – og havandi veðurlagið í huga – og vænta sær, at fólk fara at parkera langt uttan fyri miðbýin og koyra við sjútsbussum oman í býin til smáørindi, tað er so veruleikafjart, sum nakað kann vera.

Í størri býum so sum Keypmannahavn, París ella New York, har ber til at hava skipað viðurskifti við parkering. Har kunnu tey hava serligar reglur fyri tey sum búgva í miðbýnum, aðrar til tey sum arbeiða í miðbýnum og uppaftur aðrar til fólk, sum bara hava smáørindi. Hetta ber av onkrari orsøk ikki til í Havn. Her eru tað bara landsstýrisfólk og starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu sum fáa sersømdir við parkering á almenum vegi.

Ynskir býráðið ein lívligan miðbý – har handilslívið blómar, so er at lurta eftir teimum, ið kenna trupulleikan og virða tørv teirra.

**Í SMS kenna tey – og virða tørvin á parkeringslássum**



# Enn ein bók um havnarfólk frá Birgari



Í dag, mikudagin 24. november, verður ein nýggj bók hjá Birgari Johannessen løgd fram í Posthúskjallaranum í Tórsgøtu í Havn.

Talan er um bókina »Tórshavn - býur og býarbørn«, ið snýr seg um havnarfólk, sum eru født árini 1901 til og við 1905. Bókin er 240 síður við hópin av myndum og ymiskum yvirlitum. Í hesum tíðarskeiði var m.a. fyrsta fimleikarfelag í landinum stovnað eins og fyrsta hornorkestur, eins og Havnar Boltfelag, Losjan og fyrsti føroyski politistur verður settur í starv.

Í bókini stendur m.a. hvat kommunan kostaði at reka í 1902-1903, eins og dagførdur skipalisti er í bókini. Perman á bókini er prýdd við einum málningi, sum Kristin í Geil málaði umleið 1910.

Bókin er bygd upp sum eitt uppslagsverk, ið hevur stóran týdning fyri Havnina, sum helst er einasti býur í heiminum, sum kann vísa á lívsskeiðið hjá hvørjum einstøkum borgara, sigur Birgar Johannessen.

Bókin verður løgd fram og signerað í Posthúskjallaranum mikudagin frá kl. 15-18.



## Bygg bara Heðin

RÓSA SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 27



## Fíggjarliga gongur skeivan veg í Havn

JAN CHRISTIANSEN
KJAK Á SÍÐU 12

# Jólaboð komin




Jólaboð 2010, sum KFUM í Havn gevur út, eru komin í bókabúðirnar.

Í bókini er hópur av tilfari til fólk í øllum aldri, bæði siðsøguligt, søgur og yrkingar. Av tí siðsøguliga kunnu vit nevna, at Gudrun Zachariasen sigur frá, tá ið heilsan hjá manni sínum fer at bila, og hann doyr. Hesin parturin hjá Gudruni er tann seinasti, sum kemur í Jólaboð.

Hesa ferð hevur Theodor Olsen kvívíkarprestur skrivað inngangin.

Permumyndin er gomul mynd í Havn av Tinghúsvegnum niðaneftir.

Janus Dam Guttesen hevur teknað tekningarnar í bókini.

Guttorm Zachariasen hevur lagt Jólaboð til rættis.

Jólaboð eru 88 síður og kosta 100 krónur eintakið.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*